

*Manningin á Vestmenningi skrálar av gleði, eftir sera spennandi endaspuurt sigurin á Eysturoyingi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# sjógvi á jólanátt

at svara aftur, tá ið Vestmenningur tók nøkur rimmar tøk. Munurin minkaði og minkaði, og eftir at grøni, guli og hvíti báturin var komin undan Eysturoyingi, var Vestmenningur á odda.

Tá ið bátarnir fóru um málið var munurin ikki so stórur, men tað var eingin ivi um, at tað var Vestmenningur, sum vann í heimasjógvi, og at tað harvið er spenningur í FM kappingini.

Hoyvíkingur var væl við fyrra partin av teininum, men enn eina ferð varð staðfest, at tá ið mest um galt, vóru knoturnar ikki tær somu, sum tær vóru umborð á Eysturoyingi og serliga Vestmenningi!

Fyri tíggju árum síðani vann Vestmenningur í Vestmanna í tíðini 4.27.22. Leygardagin vóru líkindini nógv verri, enn tey vóru á Vestanstevnu í 2000. Men hesa ferð eydnaðist tað Vestmenningi at rógva næstan eitt sekund skjótari, enn vestmenningar gjørdu fyri tíggju árum síðani.

*trondur@sosialurin.fo*

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmenningur | 04:26.09 |
| 2 | Eysturoyingur | 04:26.17 |
| 3 | Hoyvíkingur | 04:33.07 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 33 |
| 2 | Vestmenningur | 32 |
| 3 | Hoyvíkingur | 25 |

# Kvívíkingur tikin á heimabeiti av argjamonnum



*So eydnaðist Argjabátinum at koppa kvívíkingum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**8-MANNAFØR Eftir at tað fleiri ferðir hevur verið tætt við, eydnaðist tað hesa ferð einum kappingarneyta at fella kvívíkingar, har sum teir annars eru best kendir**

Tróndur Arge

Í fýra teimum fyrstu róðrunum í ár hevur Kvívíkingur verið fremstur í hesi kappingini. Seinastu ferðirnar hava sigrarnir ikki verið so sannførandi, sum teir vóru fyrr í summar, og tí kundi tað bent á, at annar vinnari kundi bjóða seg fram.

Og soleiðis var tað leygardagin.

Í fjør var Argjabáturin fullkomuliga suverenur í hesi kappingini. Í fýra teimum fyrstu róðrunum í ár hevur nýggja manningin umborð á Argjabátinum ligið framvið, uttan at tað hevur eydnast at vinna. Kvívíkingur hevur vunnið hvørja ferð, og Argjabáturin hevur verið nummar tvey hvørja ferð – uttan á Skálafjørðinum, tá ið Friggjarin stakk seg fram ímillum Kvívíking og Argjabátin.

Tíðarmunurin frá Kvívíkingi og til Argjabátin var á Norðoyastevnu trý sekund. Í Sundalagnum var hann minni enn eitt hálvt sekund, á Eystanstevnu var hann trý sekund, og á Jóansøku var hann eitt sekund.

Tí var tað ikki púra óvæntað, at Argjabáturin sýndi so sannførandi avrik í Vestmanna:

Argjabáturin brendi seg fram um kappingarneytarnar beinanvegin, og Argjabátuin stýrdi kappingini allan 1000 metra teinin.

Sum fleiri ferðir fyrr í summar var Kvívíkingur ikki millum teir fremstu beinanvegin. Kvívíkingar plaga tó at orna paragraffirnar, men tað megnaðu teir ikki leygardagin.

Argjabáturin var ongantíð hóttur í endaspurtinum, og at hetta ikki var dagurin hjá kvívíkingum, sum hvønn dag fyrireika seg til kappingarnar í Vestmanna, varð undirstrikað við, at eisini Friggjarin úr Miðvági setti Kvívíking upp á pláss.

Kvívíkingur megnaði á triðja plássi akkurát at vinna á Árnfirðingi, sum aftur hesa ferð var við til at seta dám á kappingina á fyrsta partinum av teininum. Báðir bátarnir úr høvuðsstaðnum kappaðust um at sleppa undan aftastu brík. Ta kappingina vann Ørvur á Knørri.

Úrslitið ber við sær, at tað er komið eitt sindur av spenningi í FM kappingina, men tað skal kortini vilja illa til hjá kvívíkingum á Vestanstevnu í Sørvági og 28. juli, um teir ikki á Ólavsøku skulu standa við FM heitinum.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 04:34.16 |
| 2 | Friggjarin | 04:36.00 |
| 3 | Kvívíkingur | 04:37.09 |
| 4 | Árnfirðingur | 04:38.23 |
| 5 | Knørrur | 04:43.06 |
| 6 | Ørvur | 04:49.04 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 33 |
| 2 | Argjabáturin | 30 |
| 3 | Friggjarin | 25 |
| 4 | Árnfirðingur | 22 |
| 5 | Ørvur | 13 |
| 6 | Knørrur | 12 |